


## DONG skal spara

Fíggjarkreppan noyðir nú ta stóru, almennu donsku orkufyritøkuna DONG at spara, og tað kann fáa avleiðingar fyri starvsfólkið. Leiðslan í Dong sigur, at hon hevur gjørt av at skarva 350 milliónir krónur av útreiðslunum í ár og uppaftur meiri næsta ár. Anders Eldrup, stjóri í DONG, sigur við TV2, skerjingin kann fara at kosta arbeiðspláss. Hann vísir á, at vinningurin hjá fyritøkuni var góðar 700 milliónir krónur í fyrsta ársfjórðingi, og at tað var munandi minni enn í sama ársfjórðingi í fjør, hóast umsetningurin var størri í ár.



*Morten Hahn-Pedersen, professari verður ein av gestafyrilesarunum á oljuráðstevnuni í Havn 20. mai. Hann fer at tosa um Esbjerg, áðrenn og eftir at oljan gjørdi innrás.*

# Hvat kann Esbjerg læra Føroyar um oljutilgongd!

**Hvørjar royndir hevur danski oljuhøvuðsstaðurin, Esbjerg gjørt sær eftir at oljan tók yvir sum høvuðsvinna eftir fiskivinnuna! Og kunnu føroyingar læra av hesum. Hetta er ein av spurningunum, sum verður viðgjørdur á Oljuráðstevnuni á Hotel Hafnia mikudagin. Morten Hahn Pedersen, sum hevur fylgt oljutilgongdini í Esbjerg fer at greiða frá. Eftir hetta fara Árni Olafsson og Petur Joensen at tosa um føroysku tilgongdina.**

OLJA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað, sum helst hevur størsta áhugan millum føroyingar í løtuni, tá vit tosa um oljuleiting, er komandi boringin á Anne Marie leiðini á landgrunninum. Hetta er sjeyndi brunnurin um okkara leiðir, sum eftir ætlan skuldi borast í summar. Nú er tó avgjørt at flyta boringina til tíðliga næsta ár, tí boripallurin er ikki klárur. Hóast hetta so verður kortini sett fokus á nettupp hesa risastóru verkætlan á komandi oljuráðstevnuni. Har fer ein av oddamonnunum fyri leiting um okkara leiðir, Gianpiero Miglio frá ENI at greiða frá boriverkætlanini.

Eisini oljuleiting og framleiðsla vestan fyri Hetland hevur okkara stóra áhuga, nú fleiri av oljufundunum har liggja tætt upp at føroyska markinum. Gongdin har kann fáa stóran týdning fyri framtíðar oljuvirksemi á okkara landgrunni. Til tess at lýsa hetta spennandi olju- og gassøkið fer DONG at senda ein av sínum fremstu serfrøðingum til oljuráðstevnuna. Hann eitur Simon Slater.

Í skránni verður so farið eitt stig víðari eystureftir, móti danska oljuhøvuðsstaðnum Esbjerg. Undir heitinum "Esbjerg fyri og eftir oljuna" fer kendi esbergensarin Morten Hahn-Pedersen, sum er professari og hevur skrivað nógv um Esbjerg og oljuna, at greiða frá gongdini har. Hann fer eisini at tríva í kolvetnistilgongdina í Danmark sum heild.



Eftir henda fyrilesturin verður so farið aftur til Føroya og spurningurin um, hvørjar avleiðingar eitt føroyskt oljufund fer at hava á samfelagið og um vit longu nú eiga at taka upp kjak um hetta, verður settur Árna Olafsson, fyrrverandi formanni í Oljuráðleggingarnevndini og Petur Joensen, stjóra á Jarðfeingi. Eisini fara teir at meta um oljutilgongdina higartil og hvørjar vónirnar eru til framtíðina.

Seinast á skránni fer Martin Heinesen, verkætlanarleiðari at tosa um landgrunnsmarkið uttan fyri 200 fjórðingar.

Tað eru Oljuvinnufelagið/ Vinnuhúsið, Oljutingið og Miðlahúsið, sum hava tikið stig til oljuráðstevnuna, sum verður á Hotel Hafnia.

Enn er møguleiki at tekna seg til oljurástevnuna á www.industry.fo